## Bilstjórar í verkfalli

Fleiri túsund lastbilstjórar í Fraklandi, Spania og Portugal taka nú stig til tess at mótmæla tí høga oljuprísinum. Í gjár stongdu teir fleiri vegir við Madrid og aðrar spanskar stórbýir umframt fleiri vegir, sum ganga um markið millum Spania og Frakland. Ætlandi skuldu umleið 70.000 spanskir lastbilstjórar fara í verkfall í dag, og í Portugal hava lastbilstjórarnir hótt við at leggja landið lamið, fáa teir ikki bíligari olju í tangarnar.



*Spanskir lastbilstjórar taka sær av løttum í góðveðrinum*
*Mynd: Reuters*



*Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, harmast um lítla áhugan fyri størvunum sum lektari og adjunktur á Fróðskaparsetrinum.*

# Lítil áhugi fyri lektarastarvi

**Rektarin á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Pauli Joensen, harmast um, at bert ein hevur søkt starvið sum lektari í løgfrøði á Fróðskaparsetrið Føroya. Ein hevði søgt starvið sum adjunktur, men tók umsóknina aftur**

LEKTARASTARV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ikki kann sigast, at áhugin fyri nýggja lektarastarvinum innan løgfrøði á Fróðskaparsetri Føroya, er stórur. Bert ein umsøkjari er til annað av teimum báðum nýggju størvunum sum ávikavist lektari og adjunktur í løgfrøði. Spurningurin er tí, um krøvini til umsøkjararnar eru ov høg.

- Síðani 1999 hava lektarakrøvini á Fróðskaparsetrinum verið ein Ph.D. grad ella samsvarandi og er hetta sama kravið sum í hinum Norðurlondunum. Ein lektari skal eisini hava royndir sum granskari og undirvísari. Skulu vit javnmetast við onnur universitet í Norðurlondum, so mugu vit seta somu krøv.

Tað ber ikki longur til at siga: „Undskyld, jeg er færing“, sigur Jóan Pauli Joensen.

Rektarin á Fróðskaparsetri Føroya heldur ikki, at krøvini til starvið sum adjunkt eru ov høg.

- Ein adjunktur skal hava kandidatprógv ella samsvarandi og royndir í gransking, ella útfrá tí, sum hann hevur gjørt, metast at hava góð granskingarevni. Tað er eisini tað, sum stóð í lýsingini, men so settu vit afturat „og um viðkomandi ikke longu hevur ella er komin ávegis við Ph.D.-lestri, skal hann ella hon lata seg innskriva til Ph.D.-lestur í løgfrøði“. Tað er sostatt einki krav um Ph.D.grad til adjunkt, vísir Jóan Pauli Joensen á.

Sjálvur heldur hann, at hetta er ein avbera góður møguleiki hjá einum ungum løgfrøðingi, men tíverri er trupulleikin hjá Fróðskaparsetrinum tann sami, sum hjá øðrumuniversitetum. Ungir dugnaligir løgfrøðingar hava so nógvar aðrar møguleikar.

### Førleiki vantar

Spurningurin er so, um tað er nóg stórur áhugi millum føroyskar løgfrøðingar at granska.

- Tað er óivað ymist, hvussu áhugin er. Summir vilja helst tjena so nógvar pengar sum møguligt straks, meðan onnur hava hug at útbúgva seg meira, men uppá longri sikt vil ein løgfrøðingur við starvið á universiteti kunna virka meira uttanveltaður og autoritativir, enn aðrir løgfrøðingar, og tí hevur okkara lítla land harðliga brúk fyri, sigur rektarin á Fróðskaparsetri Føroya.

Søgur ganga um, at tað skal verða sagt við føroyskar løgfrøðingar, at krøvini eru so høg, at eingin hevur førleika at søkja.

- Tað er ikki bert komið mær fyri oyru, men eg veit at meginparturin av føroysku løgfrøðingum hava fingið at vita frá einum nýggjum felagsskapi millum løgfrøðingar, at tað er næstan eingin, sum hevur førleikan at søkja.

Hatta harmar meg, og eg eri keddur av, at tað er hent. Einasta krav til starvið sum adjunktur er at umsøkjarin er granskingarhugaður og vil fara undir eina granskaraútbúgving. Hatta hevur hann ella hon 4 ár + eitt til, sigur Jóan Pauli Joensen.

Hóast miðað verður ímóti, at setrið verður eitt altjóða universitet, so er løgfrøðin rættiliga serføroysk, so mett verður frægast, um ein føroyingur kom í adjunktstarvið, men um ikki, verður lýst eftir útlendingi.

### Eingin risaløn

Rektarin á Fróðskaparsetri Føroya vónar, at tað fer at bera til at fáa føroyskar løgfrøðingar í størvini á Fróðskaparsetrinum.

- Møguleikin er eisini tann, at vit skulu gera adjunktstarvið meira opið, so bæði ung og eldri kunnu søkja tað. Eg vóni at fleiri fara at seta seg í samband við meg, tí eg haldi at tað verður syrgiligt, um at tað millum so nógvar løgfrøðingar, sum vit hava í Føroyum, ikki er onkur, sum hevur hug at fara universitetsvegin. Tað er nóg mikið at granska í, sigur Jóan Pauli Joensen.

Hann viðgongur, at talan ikki er um nakra fyrstaløn.

- Tað er sjálvandi ein relevantur spurningur, tí lønirnar innan fyrisitingarstørv eru so, at tú verður tú ráðgevi ella deildarleiðari, so hevur tú eina løn, sum er meira enn ein lektari á setrinum. Hin vegin er lønin ikki alt í lívinum, eitt universitetsstarv ber nógv áhugavert í sær, men skal setrið hinvegin kappast um tey góðu fólkini, so mugu vit eisini kunna løna teimum. Men eg havi tað álit á teimum akademisku fakfeløgunum, at tey duga at síggja hetta og arbeiða fyri, at lærarar og granskarar fáa eina løn sum er kappingarfør, sigur rektarin á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Pauli Joensen, sum leggur aftrat, at teir heilt skjótt fara at lýsa størvini leys av nýggjum.